# Handilstreytir fyri virðisbrøv

## Inngangur

Hesar treytir eru galdandi, tá ið tú handlar við fíggjarligum tólum – harímillum virðisbrøv – ígjøgnum BankNordik. Handilstreytirnar byggja á Lóg um Virðisbrævahandil v.m. og tilhoyrandi kunngerðir um eitt nú góðan virðisbrævahandilssið. Harumframt á viðtøkur fyri NASDAQ OMX Nordic og etiskar reglur fyri keypsskálar. BankNordik bjóðar handil við lánsbrøvum, partabrøvum og øðrum fíggjarligum tólum. Kundar kunnu fremja handlar umvegis deildir bankans við at venda sær til BankNordik umvegis telefon ella netbankan.

BankNordik mælir ikki til, at handilsordrar verða sendir umvegis teldupost, bræv ella telefaks, um ikki annað greitt er avtalað. Hetta orsakað av, at ein ordri verður mettur at vera tíðarkritiskur, og at teldupostar, brøv ella telefaks í ávísum førum ikki verða móttikin og/ella lisin alt fyri eitt. Tú skalt tískil rokna við longri avgreiðslutíð, um tú sendir ordrar umvegis teldupost, bræv ella telefaks. Vit vilja í hesum sambandi harumframt gera vart við, at um tín ordri verður sendur umvegis teldupost, bræv ella telefaks, verður hann ikki roknaður sum móttikin og skrásettur, fyrr enn bankin hevur fingið kunnleika um hann.

BankNordik hevur flokkað kundar sínar soleiðis: detailkundar, professionellir kundar og góðkendir mótpartar. BankNordik kunnar teg um tína flokking í brævi. Í viðgerð av ordrum frá detailkundum og professionellum kundum, er Ordrafremjingarpolitikkurin hjá BankNordik altíð galdandi.

## Sløg av ordrum

BankNordik bjóðar tvey ymisk sløg av ordrum

- Limit ordrar
- Marknaðarordrar

Ein limit ordri er ein ordri, har tú gevur BankNordik boð um at keypa ella selja eitt virðisbræv til ein ásettan kurs, ella um møguligt ein betri kurs, og í eini ávísari mongd ella fyri eina ávísa upphædd.

Ordrar, ið ikki fella inn undir lýsingina av einum limit ordra, verða roknaðir sum marknaðarordrar, har kundin biður um at fáa avroknað ordran best møguligt.

## Handilshættir

BankNordik bjóðar hesar handilshættir:

- Strakshandil
- Marknaðarordri
- Ordri

Í tann mun tað er gjørligt, fremja vit allar ordrar við BankNordik sum mótparti, um hetta ikki er ein vansi fyri kundan. Undir serligum umstøðum tilskilar BankNordik sær rætt til ikki at fremja ein ordra. Tað kann t.d. vera, tá ið kursmunurin millum boð og útboð er ov stórur, tá ið eingin kursur er, ella tá ið eingin støðugur handil er í tí ávísa partabrævinum. BankNordik kann velja at útseta ella ógilda ein tílíkan ordra.

## Strakshandlar

BankNordik ásetur strakskursir í eini røð av virðisbrøvum. Við strakskursum fært tú alt fyri eitt at vita, hvønn kurs tann ásetta nøgdin av virðisbrøvum kann keypast og seljast fyri. Nøgdin av virðisbrøvum kann broytast frá degi til dag, eins og tað kann vera ymiskt, hvørji virðisbrøv vit áseta strakskursir í. Deildin, ið avgreiðir ordrar, kann geva tær upplýsingar um kursirnar á teimum virðisbrøvum, ið vit hava valt at áseta prísir á, og tískil er møguligt at handla innanfyri ta avmarkaðu upphædd, ið er galdandi fyri valda

virðisbrævið. Tær nøgdir, ið verða útbjóðaðar til strakshandil, verða ásettar av BankNordik og samstarvsfelagum hjá BankNordik. Hvørji virðisbrøv, til hvønn kurs og í hvørjum nøgdum sæst eisini í netbankanum. Boð- og útboðskursir í handilsskipanini hjá NASDAQ OMX Nordic verða sum útgangsstøði nýttir. Kursurin verður ásettur so hvørt, soleiðis at kursurin altíð liggur innanfyri ella á best ásetta boðnum ella útboðnum á minst einum handilsposti.

Um einki boð og/ella útboð er komið á minst einum handilsposti á handilsskipanini hjá NASDAQ OMX Nordic, tá ið handilin skal fremjast, kann BankNordik velja at áseta ein strakskurs við støði í eini meting av best møguliga kursinum, grundað á hvussu umsetilig virðisbrøvini eru og á galdandi kursvirðið í marknaðinum sum heild.

Við strakshandlum á lánsbrøvum verður roknað eitt ískoyti/ein frádráttur, sum sæst í teirri til hvørja tíð galdandi prísbók, sum verður dagførd so hvørt og sæst á www.banknordik.fo ella verður útflýggjað á deildum bankans. Strakskursir verða ásettir í upplatingartíðini hjá NASDAQ OMX Nordic teir dagar, ið keypsskálin er opin.

## Ordrar

Ein ordri er ein handil í kommissión, har BankNordik kann velja at avrokna handilin við bankanum sum mótparti við støði í somu treytum sum undir Strakshandlum. Tá tú  handlar við einum ordra, kennir tú ikki prísin, tá tú gevur ordran, sum tú gert við eitt nú strakshandli. Um tað, tá handilin verður gjørdur, ikki er boð og/ella útboð á handilsskipanini hjá NASDAQ OMX Nordic, kann BankNordik velja at áseta kursin við støði í eini meting av best møguliga kursinum, grundað á hvussu umsetilig virðisbrøvini eru og tað galdandi kursvirðið í marknaðinum sum heild.

BankNordik kann eisini velja at taka tín handil í kommissión, sum merkir, at BankNordik tína vegna keypir í marknaðinum og avroknar við teg til tann nádda kursin. Ordrar í kommissión kunnu býtast sundur ella leggjast saman og handlast til ymiskar prísir ígjøgnum dagin, um marknaðurin ikki gevur møguleika fyri at avrokna allan ordran samstundis. Avrokningin av ordranum verður framd so hvørt ígjøgnum dagin. Um tað er møguligt, verður royndt at avgreiða ordran og avrokna innan 10 minuttir, eftir at hann er móttikin.

Serligt fyri ordrar í donskum partabrøvum bílagdir uttan um netbankan: Um tú bíleggur tín ordra umvegis BankNordik og ikki umvegis netbankan, verður tín ordri sum útgangsstøði handlaður til 15.30 miðalkurs. Ordrar bílagdir eftir kl. 09.00, verða avroknaðir handilsdagin eftir +/- frádrátt sambært galdandi prísbók. Størri ordrar, ið verða mettir ikki at kunna viðgerðast til miðalkurs, verða avroknaðir sum ein handil í kommissión.

## Limit ordri

Viðvíkjandi ordrum um keyp/sølu av virðisbrøvum, har tú í sambandi við keyp biður um ein hámarkskurs, og við sølu ein lágmarkskurs, er tað galdandi, at handilsprísurin skal lúka tann limiteraða (avmarkaða) kursin, íroknað møgulig ískoyti/frádráttir hjá BankNordik, men uttan kostnað, áðrenn handilin verður framdur. Um vit, orsakað av marknaðarviðurskiftum, ikki kunnu handla innan 5 keypsskáladagar, fellur limiteraði (avmarkaði) ordrin burtur, um eingin onnur avtala er gjørd. Viðhvørt kunnu frávik verða gjørd í omanfyri nevndu avrokningargrundreglu. Undantaksstøður kunnu millum annað koma fyri í serligum marknaðarviðurskiftum ella viðvíkjandi virðisbrøvum, har tað ikki er støðugur handil. Um vikið verður frá avrokningargrundregluni, verður handilin roknaður sum ein kommissiónshandil. Tað hevur við sær, at virðisbrævið antin verður handlað umvegis keypsskálan ella undir treytum, ið líkjast strakshandli. Um eitt undantak verður gjørt, sæst hetta á tíni handilsnotu. Um ein limit ordri viðvíkjandi partabrøvum, ið er tikin upp til handil á einum reguleraðum marknaði, ikki verður framdur alt fyri eitt eftir galdandi marknaðartreytum, roynir BankNordik at fremja ordran skjótast gjørligt. Hetta verður gjørt við beinanvegin at almannakunngera limit kundaordran á ein tílíkan hátt, ið ger upplýsingarnar lætt atkomiligar fyri aðrar

marknaðarluttakarar, um tú ikki greitt hevur avgjørt annað. BankNordik kann krevja eitt gjald fyri limit ordrar, óansæð um handilin verður framdur ella ikki.

## Marknaðarordri

Ein marknaðarordri er ein ordri at keypa ella selja eitt fíggjarligt tól til ein kurs, ið endurspeglar prísin á marknaðinum í løtuni. Verður ein ordri framdur á henda hátt, verður handilin mettur sum ein marknaðarkurshandil.

Ein marknaðarordri verður sum oftast framdur sum ein handil, men hann kann verða býttur sundur, um so er, at hann er meira enn ein handilspostur. Kundin verður avroknaður í fleiri umførum ella til eitt vektað miðaltal av teimum prísum, sum eru náddir (verður t.d. nýtt við lutfalsliga stóru stórum handlum samanborið við gjaldføri).
Marknaðarordrar, har limit ikki fylgir reglurnum um kurslop hjá handilsstaðnum, verða sum keypsordrar rundaðir niður til næsta rætta kurslop og verða sum søluordrar rundaðir upp til næsta rætta kurslop.

Ein marknaðarordri kann strikast, um so er, at hann ikki er framdur á handilsstaðnum.
BankNordik átekur sær onga ábyrgd fyri, at innlagdir ordrar kunnu strikast.
Tá ordrin er framdur, verður nota send.

Skilt verður ímillum tveir bólkar av marknaðarordrum:

- Marknaðarordrar, ið verða miðlaðir beinleiðis víðari til eitt handilsstað
- Aðrir/handhildnir marknaðarordrar

Niðanfyri verða hesir báðir bólkar av marknaðarordrum umrøddir hvør sær.

## Marknaðarordrar, ið verða miðlaðir beinleiðis víðari til eitt handilsstað

Marknaðarordrar, ið verða miðlaðir beinleiðis víðari til eitt handilsstað, verða nevndir DOR (Direct Order Routing). Skilt verður ímillum tveir bólkar av ordraslagnum DOR:

- Marknaðarordrar, ið verða miðlaðir víðari til NASDAQ OMX Keypmannahavn og Stokkhólmur
- Marknaðarordrar, ið verða miðlaðir víðari til Virðisbrævameklara

Miðlan til virðisbrævameklara verður nýtt í sambandi við fíggjarlig tól, ið ikki eru listað á NASDAQ OMX Keypmannahavn og Stokkhólmur. Bæði sløgini vera lýst hvør sær. Felags fyri tey er, at ordrar eru galdandi í 7 keypsskáladagar, um ikki annað er avtalað, og at ordrar verða miðlaðir víðari danskar keypsskáladagar.
Tá ordraslagið DOR verður nýtt, verða ordrar altíð umbidnir við limit. Tá ein keypsordri við limit verður umbiðin, skal hægsti kursurin, sum ordrin ynskist avroknaður til, tilskilast. Tá ein søluordri við limit verður umbiðin, skal lægsti kursurin, sum ordrin ynskist avroknaður til, tilskilast. Ordrar við limit kunnu fremjast 24 tímar um samdøgrið treytað av handilsviðurskiftunum á staðnum, tó bert innanfyri upplatingartíðirnar hjá viðkomandi handilsstaði. Limit kann broytast, um so er, at ordrin ikki er framdur á handilsstaðnum. BankNordik kann vísa frá sær at taka ordran við, um limit víkir munandi frá seinast goldna kursinum ella seinasta endakursi.

## Marknaðarordrar (DOR) til NASDAQ OMX

Tá ordraslagið DOR til NASDAQ OMX verður valt, verður ordrin miðlaður beinleiðis víðari til handil á NASDAQ OMX Keypmannahavn og Stokkhólmur. Um tað er gagnligt fyri kundan, kann ordrin haðani miðlast víðari til onnur handilsstøð fyri á tann hátt at náa tann best møguliga kursin (Smart Order Routing). Niðanfyri verður greitt frá mest týðandi hugtøkunum í sambandi við ordraslagið DOR til NASDAQ OMX.

## Ordrabók

Ordrabókin fyri eitt partabræv ella eitt íløguprógv er eitt savn av keyps- og søluordrum umframt aðrar upplýsingar, sum knýta seg til virðisbrævið.

## Handilspostur og seinast handlaði kursur

Støddin á øllum ordrabókum á NASDAQ OMX Keypmannahavn og Stokkhólmur er 1, hetta merkir, at allir handlar dagføra seinast handlaða kursin.

## Kurslop

Kurslop sigur hvussu stórur munur í minsta lagi skal vera á keyps- og søluprísinum, og hvussu nógv kursurin skal broytast við hvørja ferð.
Eitt kurslop á 1 merkir, at kursurin á einum ordra kann setast í heilum krónum t.d. 2.166 og 2.167. Eitt kurslop á 0,5 merkir, at kursurin á einum ordra kann leypa við 0,50 kr. hvørja ferð, t.d. 505,50 og 506,00.
Tey til hvørja tíð galdandi kurslopini fyri einstøku ordrabøkurnar, eru at finna á heimasíðuni hjá NASDAQ OMX Nordic www.nasdaqomxnordic.com. Tú kanst eisini fáa hesar upplýsingar frá tínum ráðgeva.

## Handilsdagurin á NASDAQ OMX Keypmannahavn og Stokkhólmur

Handilsdagurin á NASDAQ OMX byrjar við einum 1-tíma upplatingartíðarskeiði, sum fær ein enda við eini upplatingarmannagongd, har upplatingarkursurin verður roknaður. Tíðarskeiðið verður nevnt undanhandil ella prehandil. Ordrar, ið verða lagdir inn ímillum kl. 7.45. og kl. 8.00 koma við í upplatingarmannagongdina, eins og handlar við limit, sum ganga yvir fleiri handilsdagar, verða tiknir við í upplatingarmannagongdina. Fyri ávís virðisbrøv á NASDAQ OMX er intradag-uppboð innført, ið fer fram eins og upplatingarmannagongdin. Intradag-uppboðið byrjar kl. 12.30 og endar kl. 12.35, og síðan fer handilin yvir til støðugan handil. Tú kanst lesa meira um intradag-uppboðið á http://www.nasdaqomxnordic.com/shares/intraday-auction/intraday-auction-in-detail.

Eftir upplatingarmannagongdina fara ordrabøkurnar yvir til støðugan handil. Tann støðugi handilin er frá kl. 8.00 til kl. 15.55 í Keypmannahavn og til kl. 16.25 í Stokkhólmi. Íløguprógv listað í Keypmannahavn fara í støðugan handil kl. 8.45.

Handilsdagurin endar við einum afturlatingarparing, ið er frá kl. 15.55 til kl. 16.00 í Keypmannahavn og frá kl. 16.25 til kl. 16.30 í Stokkhólmi. Ordrabøkurnar verða paraðar frá ávikavist kl. 16.00 í Keypmannahavn og kl. 16.30 í Stokkhólmi, og inntil allar bøkurnar eru paraðar. Síðani endar handilin. Norsku partabrøvini, ið verða handlaði í Stokkhólmi, fylgja upplatingartíðunum á Oslo Børs.

## Frá ordra til handil

Undir støðugum handli verða ordrar raðfestir í eini ávísari raðfylgju:

- Besti kursur
- Tíð fyri tá ordrin varð lagdur inn í ordrabókina

Handlarnir verða framdir við, at tað eru eins ella umskarandi kursir á keyps- og søluordrunum.
Ordrin við hægsta keypsprísi ella lægsta søluprísi verður framdur fyrst.
Handilskursurin veðrur ásettur eftir tíðarraðfylgjuni. Tað vil siga, at ordrin, ið er fyrst skrásettur ásetur handilskursin.

## Marknaðarordri (DOR) til virðisbrævameklara – útlendskir marknaðarordrar

Tá ordraslagið DOR til virðisbrævameklara verður valt, verður ordrin miðlaður beinleiðis víðari til ein virðisbrævameklara og harfrá beinleiðis út á viðkomandi handilsstað.
Hesir marknaðarordrar kunnu viðgerast allar handilsdagar ímillum kl. 8.00 og kl. 22.00. Uttanfyri hetta tíðarbil eru ordrarnir framhaldandi virknir, um viðkomandi marknaður er opin.
Reglurnar fyri upplatingartíð, uppboð, kurslop og støddir á handilspostum fylgja reglunum fyri tann einstaka keypsskálan.

### Aðrir/handhildnir marknaðarordrar

Ein marknaðarordri, ið ikki verður miðlaður beinleiðis víðari, kann antin avgreiðast við BankNordik sum mótparti ella verða lagdur út á viðkomandi handilsstað. Í tann mun tað ikki er møguligt at avrokna ein marknaðarordra fult út, tilskilar BankNordik sær rætt til at avrokna ordran partvíst.

Ein marknaðarordri, ið ikki verður miðlaður beinleiðis víðari, kann samansetast við limit. Við limit skal hædd takast fyri ískoyti/frádrátti hjá BankNordik sambært galdandi prísupplýsingum. Ordrar við limit kunnu avgreiðast 24 tímar um samdøgrið, treytað av handilsviðurskiftunum á staðnum, tó bert innanfyri upplatingartíðirnar hjá viðkomandi handilsstaði. Limit kann broytast, um so er, at ordrin ikki er avgreiddur á handilsstaðnum.

BankNordik kann vísa frá sær at taka ordran við, um limit víkir munandi frá síðst goldna kursi ella síðsta endakursi. BankNordik kann harumframt vísa frá sær at taka ordran við, um BankNordik ikki hevur møguleika fyri at handla pappírið umvegis handilsstaðið hjá BankNordik ella bankin ikki kann varðveita virðisbrøvini.
Marknaðarordrar, ið ikki verða miðlaðir beinleiðis víðari, eru sum útgangsstøði galdandi í 10 keypsskáladagar. Er ordrin givin umvegis ráðgevan, er standard gildistíðin tó 1 dag.

### Handil við virðisbrøvum skrásett á GXG Markets

GXG Markets er ein virðisbrævamarknaður, sum er góðkendur av Fíggjareftirlitinum. Her kanst tú handla til tann kursin, sum BankNordik klárar at náa á handilsdegnum við fyriliti til tíð, mongd og onnur handilsviðurskifti sum heild. BankNordik hevur eisini her skyldu til at liva upp til vanligan góðan og fakligan standard umframt at varða um tíni áhugamál.

### Handil við virðisbrøvum á útlendskum keypsskálum

BankNordik setur prís á gjaldoyrakursin við støði í kursinum hjá tjóðarbankanum 1 dag eftir at virðisbrævahandilin er gjørdur, +/- tann galdandi gjaldoyramarginalin. BankNordik kann tó víkja frá hesi reglu og seta prísin við støði í tí kursi, ið er atkomuligur á gjaldoyramarknaðinum ta løtu, tá handilin verður framdur, +/- tann galdandi gjaldoyramarginalin. BankNordik kann harumframt vísa frá sær at taka ordran við, um BankNordik ikki hevur møguleika fyri at handla pappírið umvegis handilsfelagarnar hjá BankNordik ella goyma tað í goymslubankanum hjá BankNordik.

### Handil við óskrásettum virðisbrøvum

Handil við óskrásettum virðisbrøvum er altíð ein kommissiónshandil.

### Ordrafremjingarpolitikkur

Tá ið BankNordik fremur tín virðisbrævaordra, verður hetta altíð gjørt í samsvari við okkara galdandi Ordrafremjingarpolitikk, um ikki onnur avtala er gjørd. Ordrafremjingarpolitikkurin sæst á www.banknordik.fo. Tá ið BankNordik fremur ein virðisbrævaordra, gera vit altíð okkara til, at tú fært tað besta úrslitið, har hædd verður tikin fyri prísi, kostnaði, skjótleika, fremjingar- og avrokningarlíkindum, vavi, slagi og øðrum viðurskiftum, ið hava týdning fyri fremjingina av ordranum (best execution). Um tú hevur givið eini serlig boð, fremur BankNordik ordran eftir hesum boðum. Fremjingin av ordranum eftir tínum serligu boðum kann hava við sær, at BankNordik er forðaður í at fremja sína skyldu viðvíkjandi best execution.

### Best execution

BankNordik tekur hædd fyri øllum teimum viðurskiftum, sum gera okkum før fyri at útvega tann best møguliga samlaða prísin (best execution).Tann samlaði prísurin er kursurin á virðisbrævinum ella fíggjarliga tólinum og møguligar útreiðslur, ið eru beinleiðis tengdar at ordranum. Onnur viðurskifti, so sum skjótleiki, líkindini fyri at fremja ordran og avgreiðsla í hesum sambandi, støðd á ordra og slag, umframt

marknaðarávirkan fáa bert framíhjárætt fram um beinleiðis prís og kostnaðir, tá ið tey hava jaliga ávirkan á tann besta prísin fyri teg.

## Fremjing av ordrum uttan um ein reguleraðan marknað

Í sambandi við at røkka best execution, kann BankNordik velja at fremja tínar ordrar uttan um ein reguleraðan marknað ella líknandi handilsskipanir – t.d. við at handla við BankNordik sum mótparti. Tá tú góðtekur Ordrafremjingarpolitikkin, góðtekur tú tí eisini, at BankNordik kann fremja tínar ordrar uttan um ein reguleraðan marknað ella eina aðra handilsskipan.

## Handilsstøð

BankNordik nýtir eina røð av handilsstøðum, sum áhaldandi ger okkum før fyri at røkka best møguliga úrslitinum, tá ið kundaordrar verða framdir. BankNordik metir regluliga um, hvørt handilsstøðini geva kundunum tað best møguliga úrslitið. Ein listi við mest týðandi handilsstøðnunum hjá BankNordik verður útflýggjaður í deildum bankans og sæst á heimasíðu okkara www.banknordik.fo.

## Handil við virðisbrøvum á einum reguleraðum marknaði ella gjøgnum eina aðra handilsskipan

BankNordik fremur ordrar um handil við virðisbrøvum á einum reguleraðum marknaði ella einari aðrari handilsskipan á hendan hátt: Ordrin verður alt fyri eitt lagdur út á tann reguleraða marknaðin, har bankin væntar at røkka best execution. Sum útgangsstøði er tað á tí reguleraða marknaðinum, at virðisbrøvini eru mest umsetilig. Ordrin verður framdur við BankNordik sum mótparti til ein kurs, sum í handilsløtuni liggur á ella innanfyri besta boð ávikavist útboð á tí mest umsetiliga marknaðinum fyri virðisbrævið. Ordrin verður framdur beinleiðis móti einum øðrum kundaordra til ein kurs, sum í handilsløtuni liggur á ella innanfyri besta boð ávikavist útboð á tí mest umsetiliga marknaðinum fyri virðisbrævið. Ordrin verður givin einum øðrum virðisbrævahandlara, sum avgreiðir ordran í samsvari við Ordrafremjingarpolitikkin hjá BankNordik. Ordrin verður framdur við BankNordik sum mótparti til ein prís, ið frammanundan er avtalaður við teg. Ordrin verður býttur sundur og verður framdur í samsvar við ein ella fleiri av omanfyristandandi háttum.

## Handil við virðisbrøvum, ið ikki eru avgreidd á einum reguleraðum marknaði ella gjøgnum eina aðra handilsskipan

BankNordik avroknar virðisbrøv, sum ikki eru avgreidd á einum reguleraðum marknaði ella aðrari handilsskipan, til ein kurs, sum gevur tær best møguliga samlaða prísin. BankNordik tekur millum annað atlit til rentu- og kursbroytingar, vitan um útboð og eftirspurning í marknaðinum, kursin á møguligum samsvarandi virðisbrøvum og tøkar marknaðarupplýsingar um útgevaran av virðisbrævinum umframt onnur viðurskifti.

## Handil við íløguprógvum

BankNordik hevur skyldu til at kunna teg um, hvørt bankin fær vinning ella provisjón frá útbjóðarum av fíggjarligum tólum og í hvønn mun. Hetta er eisini galdandi fyri íløgufeløg. Í hvønn mun BankNordik móttekur vinning ella provisjón sæst á www.banknordik.fo.

## Endurskoðan av Ordrafremjingarpolitikkinum

BankNordik endurskoðar á hvørjum ári, um ”Ordrafremjingarpolitikkurin” hjá BankNordik virkar eftir ætlan, og bøtir um møguligar manglar. Tann til hvørja tíð galdandi ordrafremjingarpolitikkur sæst á www.banknordik.fo ella verður útflýggjaður í eini av deildum bankans.

## Prísir

Tá tú keypir ella selur virðisbrøv, skalt tú gjalda kostnað til BankNordik. Kostnaðurin verður ásettur við støði í kursvirðinum. Tá ið tú keypir, verður kostnaðurin lagdur afturat avrokningini, og tá ið tú selur, verður kostnaðurin drigin frá avrokningini. Treytað av handilsháttinum kunnu ískoyti ella frádráttir verða í

kursinum. Kostnaður,  ískoyti, frádráttir og møguligir aðrir kostnaðir síggjast á tíni fondsnotu. Galdandi prísir síggjast í teirri til hvørja tíð galdandi prísbókini hjá BankNordik.

## Serlig viðurskifti

Undir serligum umstøðum tilskilar BankNordik sær rætt til ikki at fremja ein ordra. Serligar umstøður kunnu vera marknaðarviðurskifti, millum annað tá ið kursmunurin millum boð og útboð er ov stórur, tá ið eingin kursur er, ella tá ið eingin støðugur handil er í ávísa virðisbrævinum. BankNordik kann velja at útseta ella ógilda ordran. Um ordrin verður ógildaður, kanst tú síggja tað í netbankanum.

Støðugur handil skal skiljast sum ein áhaldandi handil við einum ikki ótýðandi umsetningi, har galdandi prísir á tí ávísa virðisbrævinum vanliga verða útbjóðaðir regluliga. BankNordik kann somuleiðis til eina og hvørja tíð velja at steðga møguleikanum fyri handli við strakskursi.

## Avgreiðsla á virðisbrævahandlum

Avgreiðsla skal skiljast sum gjald fyri og útvegan av handlaðum virðisbrøvum. Tá ið einki annað er avtalað, er avgreiðsludagurin annar keypsskáladagur eftir handilsdagin. Avgreiðsludagurin er samstundis valørdagur/rentudagur. Á útlendskum virðisbrøvum eru serligar freistir og reglur galdandi, ið tú kanst fáa upplýst í BankNordik. BankNordik útflýggjar virðisbrøv, ið tú hevur keypt treytað av, at tú rindar avrokningarupphæddina í seinasta lagi avgreiðsludagin. BankNordik avroknar upphæddina á virðisbrøvum, ið tú hevur selt, treytað av, at BankNordik á avgreiðsludegnum fær treytaleysan ognarrætt á virðisbrøvunum. Virðisbrøv, ið eru skrásett á VP skulu skrásetast í goymslu kundans í seinasta lagi keypsskáladagin áðrenn avgreiðsludagin. Á sjálvum degnum kunnu rættindi, ið stríða ímóti søluni, ikki verða skrásett – t.d. veðseting ella keypt virðisbrøv, ið tú ikki hevur fingið ræðisrætt á.

Um ein handil ikki kann fremjast á avgreiðsludegnum orsakað av, at tú ikki ert førur fyri at gjalda ella at útvega virðisbrævið, hevur tú endurgjaldsábyrgd eftir vanligum føroyskum rættarreglum. Í sambandi við handlar, sum verða framdir í kommissión, átekur tú tær váðan fyri, at tann parturin, sum BankNordik hevur handlað við, kann gjalda ella útvega virðisbrævið. Vit vísa somuleiðis til okkara goymslutreytir.

## Samanlegging av ordrum

Sambært vanligum mannagongdum kunnu ymiskir kundaordrar ella handlar verða lagdir saman, tá ið BankNordik veitir tær eina tænastu. Hetta kann m.a. koma fyri, tá ið støddin á kundaordranum ikki samsvarar við vanligu umsetninginsstøddina á viðkomandi marknaði. Hetta er oftast ein fyrimunur fyri teg, men treytað av ítøkiligum umstøðum  viðvíkjandi einum ávísum ordra, kann tað tó eisini gerast ein vansi fyri teg. Tá BankNordik leggur saman kundaordrar, skal tað ikki hava neiliga ávirkan á ordrar, ið verða avgreiddir seinni.

## Fondsnota og váttan

Tá ið BankNordik tína vegna hevur framt ein ordra, ið ikki er framdur í sambandi við ognarrøkt, fært tú skjótast gjørligt tær mest týdningarmiklu upplýsingarnar um fremjingina. BankNordik tilskilar sær rætt til at veita upplýsingar við standardkotum. Um tú ert flokkaður sum detailkundi, fært tú eina avrokningarnotu í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir, at ordrin er framdur. Um BankNordik móttekur váttan frá triðjamanni, fært tú notuna í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir, at vit hava móttikið váttanina. Hetta er tó ikki galdandi, um avrokningarnotan rúmar somu upplýsingar sum ein avrokningarnota, ið triðjimaður alt fyri eitt sendir til tín. Tá ið tú keypir ella selur lánsbrøv í sambandi við veðseting av fastari ogn, kann BankNordik senda neyðugu upplýsingarnar um fremjingina og avrokningarnotuna saman við øðrum upplýsingum viðvíkjandi láninum, tó í seinasta lagi ein mánað eftir at handilin er framdur. Í sambandi við handil við veðbrøvum, verður send ein avrokningarnota skjótast gjørligt eftir tinglýsingina. Í sambandi við ordrar frá detailkundum í sambandi við lutir í íløgufeløgum og lutir í øðrum stovnum, ið gera felags íløgur, ið verða framdir regluliga, sendir BankNordik annaðhvørt avrokningarnotur ella upplýsingarnar um fremjingina av

ordrum í minsta lagi sætta hvønn mánað. Viðvíkjandi serligum fíggjarligum tólum, so sum veðbrøvum, futures, optiónum ella líknandi tólum, fært tú upplýsingarnar í tann mun, tað er gjørligt og viðkomandi, við atliti til marknaðarsiðvenjur og tey viðurskifti, sum hesi fíggjarligu tól verða handlað undir. Tá ið tú biður um tað, gevur BankNordik tær eina støðufráboðan viðvíkjandi ordranum. Um tú ynskir tað, hevur BankNordik skyldu at veita neyðugar upplýsingar um faktuell viðurskifti í sambandi við tann ítøkiliga virðisbrævahandilin.

## Mótmæli viðvíkjandi fondsnotum og váttanum v.m.

Um tú ynskir at mótmæla innihaldinum í tíni fondsnotu, ella um tú ikki hevur móttikið notuna, skalt tú alt fyri eitt boða okkum frá. Um tú kærir ov seint, kann tað hava við sær, at BankNordik ikki fær ábyrgd av einum møguligum skaða, sum ikki hevði komið fyri ella hevði verið avmarkaður, um tú hevði vent tær til okkum í góðari tíð.

## Ógilding av feilhandlum

BankNordik tilskilar sær rætt til at strika gjørdar handlar, um so er, at talan er um eitt mistak. Feilhandil skal skiljast sum ein handil, har tað í sambandi við útvegan, sølu ella prísásetan á viðkomandi handilsstaði hevur verið talan um eitt mistak, sum mótparturin alt fyri eitt hevur gjørt vart við. Um viðkomandi handilsstað tekur avgerð um at strika ein handil, flytur BankNordik aftur viðkomandi tól og ognir til partarnar. Um tín handil verður strikaður, fært tú boð um hetta skjótast gjørligt. Um tú ynskir at fremja ordran umaftur, skalt tú seta teg í samband við BankNordik.

## Handil við pensjónspeningi og pensjónsgoymslum

Tú skalt vera serliga varug/ur við reglurnar viðvíkjandi at seta pensjónssamansparing í virðisbrøv. Reglurnar áseta millum annað, at tú í mesta lagi kanst seta 20 % av virðinum á tíni pensjónssamansparing í partabrøv, ábyrgdarkapital v.m., sum sama felag hevur givið út. Fert tú upp um hetta mark, tá tú keypir, hevur hetta sambært lógini við sær, at tín pensjónssamansparing missur sína skattligu støðu. Í hesum føri skal hon takast av og tú skalt gjalda avgjald til landið. Vit viðmæla tískil, at tú leitar tær ráðgeving, um so er, at tú ert í iva um, hvørt tínar íløgur eru í samsvar við reglurnar um íløgur av pensjónssamansparing. Ein upphædd svarandi til ásetta ársinngjaldið á kapitalpensjón, er tó altíð loyvd at seta í eitt felag.

## Navnaskráseting

BankNordik navnaskrásetir vanliga øll donsk partabrøv og íløguprógv. Um tú ikki ynskir hetta, skalt tú boða okkum frá hesum, tá ið tú gevur boð um ordran. Tað er ikki møguligt at navnaskráseta partabrøv ella íløguprógv, tá talan er um handil á útlendskum keypsskálum.

## Viðgerð av persónsupplýsingum

Í sambandi við handil við fíggjarligum tólum, savnar og viðger BankNordik tær persónsupplýsingar, ið eru neyðugar í sambandi við fremjing av tí einstaka handlinum ella veitingini av íløguráðgeving. BankNordik kann geva hesar upplýsingar til almennar myndugleikar sambært serligum lógarkrøvum.

## Upptøka av telefonsamrøðum

Fyri at tryggja at tínir ordrar verða rætt avgreiddir, kann BankNordik velja at banda telefonsamrøður viðvíkjandi handlum við virðisbrøvum og fíggjarligum tólum.

## Force majeure

BankNordik átekur sær onga ábyrgd viðvíkjandi møguligum skaðum, ið stava frá einum útlendskum ella føroyskum umboði í sambandi við fremjing av eini uppgávu fyri BankNordik. Hetta er somuleiðis galdandi viðvíkjandi skaðum, ið stava frá keypsskálum, clearing-/ virðisbrævamiðdeplum ella líknandi stovnum.

## Eftirlit

BankNordik er ein fíggjarlig fyritøka, ið er góðkend av Fíggjareftirlitinum og er harafturat undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum. (Finanstilsynet, Århusgade 110, 2100 København Ø.)

## Lógarval

Møgulig trætumál í millum teg og BankNordik verða avgjørd sambært føroyskari lóg, og avgerðir skulu fellast av Føroya Rætti.

## Broytingar í hesum treytum

BankNordik kann broyta "Handilstreytir fyri virðisbrøv" uttan ávaring, um broytingarnar eru til tín fyrimun. Í øðrum førum kann BankNordik broyta handilstreytirnar við eini hóskandi freist í samsvar við "Vanligu viðskiftatreytir okkara" ella sambært áseting í lóg ella øðrum almennum reglum. Møguligar broytingar verða fráboðaðar á www.banknordik.fo.

## Aðrar treytir

Umframt hesar treytir, verður víst til "Goymslutreytir hjá BankNordik" og "Vanligu viðskiftatreytir okkara", í tann mun tær ikki víkja frá hesum treytum.

## Gildiskoma

Hesar "Handilstreytir fyri virðisbrøv" eru galdandi frá 6. oktober 2014.